# Ongar vindmyllur í Neshaga fyrrenn til várs

**SEV ætlaði at seta tríggjar vindmyllur upp í Neshaga. Men ein seinking í viðgerðini av loyvinum førir við sær at arbeiðið er útsett í eitt hálvt ár**

ORKA
*Snorri Brend*

Ikki gongur altíð sum tey í SEV ætla og ynskja.

Tað fingu tey at sanna í málinum um tær tríggjar vindmyllurnar, ið ætlanin var at seta upp í Neshaga longu í ár. Ymiskar seinkingar hava nevniliga ført við sær, at eingin mylla verður sett upp har fyrrenn komandi vár.

Fyrireikingarnar vóru annars klárar til hetta: Í ár vóru 18 mió. kr. settar av til uppsetingina. Av tí at arbeiðið mestsum steðgaði upp, hevur SEV ikki brúkt alla upphæddina, men bert brúkt íalt 5 mió.

Tær 13 mió., ið enn ikki eru brúktar, eru ístaðin settar av til arbeiðið komandi ár, tá hesar tríggjar vindmyllurnar altso skulu setast upp.

## Løgin viðgerð

Í SEV hava tey undrað seg eitt sindur um gongdina í málinum við vindmyllunum í Neshaga. Tey halda snøgt sagt, at málið hevur fingið eina heldur løgna viðgerð.

SEV fekk nevniliga longu í 1992 og aftur í 1998 loyvi frá Yvirfriðingarnevndini at sett upp hesar vindmyllurnar. Hóast hetta so noktaði Náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar Sýslu at geva loyvi hesaferð.

Avgerðin hjá Náttúrufriðingarnevndini varð kærd, og fekk SEV viðhald í kæruni. Men avgerðin hjá hesi lokalu friðingarnevndini hevði tó kortini ta fylgju, at ætlanin við vindmyllunum varð seinkað í eitt hálvt ár. Tí verða tær tríggjar myllurnar í Neshaga ikki settar upp fyrrenn til várs aftur.

## Stórur áhugi

Tað er neyvan nakar ivi um, at vindmyllur hava stóran áhuga, tá ið tosað verður um útbyggingar við varandi orkukeldum. Og her ynskir SEV eisini at vera við í arbeiðinum at menna hesa orkukelduna.

– Vit eiga tó at fara varliga fram, serliga tá hugsað verður um trygdina og um búskapin, sigur stýrið í SEV.

SEV ynskir at menna vitunarstøðið og at kanna ávirkanina av vindmyllum í el-veitingina. Tí varð gjørd ein avtalu um eina 10 ára royndarætlan við eitt privat partafelag. Henda avtalan fevndi um uppseting av trimum myllum í Vestmanna og trimum í Neshaga.

– Fyri SEV var talan um eitt vánaligt búskaparligt úrslit við hesi ætlanini. Men tað er kortini av stórum týdningi at fáa til vega eitt so haldgott tekniskt grundarlag sum tilber.

– Tí skal henda avtalan eisini síggjast í ljósinum av, at her kann fáast fatur á hentum upplýsingum. Og hesar upplýsingar, kunnu vit brúka til at meta um møguleikarnar fyri framhaldandi útbyggingum, sigur SEV-stýrið.



*SEV ætlar at seta upp tríggjar vindmyllur í Neshaga, eins og menn longu hava gjørt tað í Vestmanna. Ætæanin var at byrja í ár, men arbeiðið fer fyrst at byrja til várs*





Lívið er ljóst og vakurt. Brádliga hendir tað, og alt broytist.

Onki er so virðismikið sum lívið og ein góð heilsa. Ein vanlukkutrygging tekur hond um tað dýrabarasta, vit eiga.

Hjá børnum fevnir tryggingin eisini um ymiskar barnasjúkur.

Tú kanst tryggja teg alt samdøgrið ella í frítíðini.

Tryggingin kann nýtast aðrastaðni enn í Føroyum. Tú kanst fara út í allan heim við henni.

Velur tú eina vanlukkutrygging, kunnu vit hjálpa tær fíggjarliga. Tryggingin er eitt trygdarnet fyri teg og alla familjuna, og ein íløga í framtíðina.

Ring til okkara á tel 345600 ella far inn á www.trygging.fo og fá nærri at vita, hvussu vit kunnu hjálpa tær.

**Tilboð í desember**

Allan desember mánað hevur Tryggingarfelagið Føroyar eitt tilboð, ið gevur foreldrum møguleika at tekna privata vanlukkutrygging, íroknað barnavanlukkutrygging, har fyrsta ársgjaldið er fyri hálvan prís!

Tí er ikki at bíða, men at tryggja børnini væl, so tey altíð eru "trygg á leiðini", hvar tey so eru og hvat tey so gera – alt samdøgrið!

**Gjaldið bara hálvt gjald fyrsta árið!**

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*





NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM

er stongt frá sunnudegnum 12. desember 2004 t.o.v sunnudagin 2. januar 2005, tó ikki týsdagin 28. desember 2004, tá Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Fiskimannafelag hava landsfund frá kl. 10-15

Telefonin svarar gerandisdagar frá kl. 10-17

Atgongumerkir til Nýggjárskonsertina eru at fáa í Kunningarstovuni í Havn, ella við at ringja á tel 317900

Sosialurin 341800

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**



# Hans Jákup Højgaard



Et liv som traditionsbærer, nyskaber og lærer
af Thomas S. Andersen